# Hava kommunurnar røktarheimstørv?

**Jacob Vestergaard**



Henda spurningin kann ein seta sær nú kjakið um tørvin á røktarheimsplássum enn einafer hevur tikið seg upp kring landið, serliga í Suðuroynni, har kommunurnar hava fingið eitt "serligt" tilboð frá landsstýrinum.

Fyri at fáa greiðu á hesum spurningi, er neyðugt at hyggja at ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur. T.v.s. hvørjar uppgávur/tænastur kommunurnar skulu taka sær av og hvørjar uppgávur/ tænastur landið skal taka sær av.

Kommunurnar hava alla tíðina miðja eftir og arbeitt fram ímóti at fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýri millum land og kommunur. Við einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýri hevði ongin ivi verið um, hvørki millum politikarar ella borgarar, hvør eigur at røkja tær ymisku uppgávurnar, landið ella kommunurnar.

Undanfarna samgonga setti gongd á hetta arbeiði, og saman við kommununum var farið undir eina miðvísa tilgongd, fyri at náa hesum málsetningi. Samstundis var funnið útav, hvussu skipast skuldi fyri, tá kommunurnar skuldu yvirtaka málsøkir/ uppgávur frá landinum, m.a. í álitinum "um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur".

Umframt at lýsa hvørji málsøkir/ uppgávur eiga at røkjast av kommununum, var sligið fast, at kommunurnar skulu valda og gjalda fyri tey málsøkir/ uppgávur tær yvirtaka. Býtið av skatinum millum land og kommunur skuldi broytast, so kommunurnar skuldu fáa lutfallsliga størri part av skattinum. Fyri at javnstilla kommunurnar í mest møguligan mun, skuldi ein skipan við at útjavnað kommunala skattin setast í verk.

Kommunurnar vóru sinnaðar til at átaka sær fleiri uppgávur, og vóru farnar undir neyðuga fyrireikingararbeiði.

Tað vísti seg tó, at bæði land og komunur høvdu trupult við at halda seg til avtalaða politikkin, nevniliga at fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Fleiri dømir eru um tað. Soleiðis byrjaðu kommunurnar at hjálpa landinum at røkja uppgávurnar á eldraøkinum, hóast hetta økið var og framvegis er ein landsuppgáva burturav.

Samstundis sum kommunurnar mótmæltu, at landið legði fleiri útreiðslur /uppgávur á kommunurnar, á ymiskum økjum, uttan at tann neyðugi peningurin fylgdi við, brúktu kommunurnar nógvan pening til at hjálpa landinum at røkja eldraøkið.

Hesin politikkur er í ansøgn við tað sum kommunurnar altíð hava vilja, nevniliga at fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Við tí ætlan sum fyrilá, at kommunurnar skuldu yvirtakað eldraøkið, var tað tó ein meining í, at kommunurnar byrjaðu at gera íløgur á eldraøkinum, hóast hetta átti at verið gjørt eftir einari neyvari ætlan, avtalað millum land og kommunur, um hvussu partarnir í felag skuldu útbyggja økið.

Nú er støðna ein heilt onnur. Sitandi samgonga hevur onga greiða ætlan um at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita.

Hóast hetta, vil landið framvegis hava, at kommunurnar brúka sínar skattakrónur til at hjálpa landinum at røkja uppgávurnar á eldraøkinum.

Tað hevur eydnast landinum sera væl at fáa kommunurnar at brúka pengar til eldraøkið, ja so væl, at í Suðuroynni verður tað nevnt eitt "serligt tilboð", at kommunurnar sleppa at gjalda til eitt økið, sum fult og heilt er ein landsuppgáva.

Niðurstøðan er greið, "kommunurnar hava ikki nakran røktarheimstørv", sum fleiri kommunalpolitikarar og onnur tykjast at halda.

Harvið er ikki sagt, at tað ikki er ein røktarheimstørvur. Fyrst og fremst eru tað okkara eldru borgarar sum hava tørv á ymiskum tænastum, eisini á røktarøkinum, tænastum, sum landið eigur at veita teimum. Tí kann tað heldur sigast, at landið hevur tørv á, m.a. at útvega røktarheimspláss.

Sum er hvar vit fleiri ymiskar loysnir á eldraøkinum. Um landið veruliga skuldi komið við einum tilboði til Suðuroynna, t.v.s. tey eldru í Suðuroynni, átti landið sjálvt at bygt ellis- og røktarheim í Suðuroynni, á sama hátt sum gjørt var í Sandoynni fyrst í 90-árunum.

Kommunurnar í Suðuroynni hava meir enn nokk við at røkja tær uppgávur, sum tær eiga at taka sær av. Vit hava júst hoyrt um trupulleikarnar á umhvørvisøkinum, har stórar íløgur skulu gerast í Vági og á Tvøroyri, fyri at fáa eina nøktandi skipan fyri spillvatni.

Landið og kommunurnar eiga í felag at taka arbeiði uppaftur við at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita.

Hetta kann gerast yvir eitt tíðarskeið, eftir einari fastari ætlan, har land og kommunur í felag útbyggja eldraøkið, við teimum ymisku tilboðunum, sum tey eldru hava tørv á, til kommunurnar at enda yvirtaka alla ábyrgdina av økinum. Hetta eigur at gerast eftir tí leisti, sum skotin er upp í álitinum um „uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur".

Kommunurnar í Suðuroynni hava ikki nakran røktarheimstørv. Tær kunnu so taka støðu til, um tær eru so væl fyri fíggjarliga og so væl fyri viðvíkjandi kommunalum tænastum, at tær meta tað verða rætt at brúka pengar til eitt øki, sum landið eigur at taka sær av.

Hvussu leikur fer, vil tíðin vísa, men eitt er vist, landið kann ikki geva kommununum ábyrgdina av manglandi tilboðum á eldraøkinum. Tað ábyrgdina hevur landið fult og heilt.

# Hitaprísur elvir til kuldaskjálvta

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Oljuprísirnir eru enn einaferð hækkaðir, og hava við hækkingini sett nýtt met. Í Danmark eru bensinstøðir í ferð við at skifta gomlu prísskeltini út, so at tey kunnu vísa tveysifraði krónutøl. Í Føroyum kosta 1.000 litrar av gassolju nú 5.300 krónur. Eitt meðal húsarhald brúkar umleið 3.000 litrar av olju um árið og skal sostatt av við slakar 16.000 krónur árliga, bara fyri at halda húsini heit.

Umleið tveir triðingar av el-framleiðsluni í Føroyum verður vunnin úr olju. Tí kann roknast við, at prísirnir hjá SEV eisini fara at verða ávirkaðir av høga oljuprísunum, og aftur har er tað brúkarin, sum fær rokningina. Í 2004 brúkti SEV umleið 30.000 tons av tungari olju.

Stjórin í Statoil segði í samrøðu við Dag og Viku týskvøldið at eingi útlit eru til at oljuprísirnir fara at lækka aftur í nærmastu framtíð. Síðani seinasta summar eru prísirnir støðugt hækkaðir, men av tí at amerikanski dollarin er fallin í virði, hava vit ikki merkt alla hækkingina. Men nú gongur dollarin uppeftir, og tí eru útlitini ikki bjørt.

### Oljuavgjaldið

Av hvørjum litri av brenniolju, sum verður fylt á tangan, eru 80 oyru oljuavgjald og 90 oyru meirvirðisgjald. Eitt húsarhald, sum brúkar 3.000 litrar av olju um árið, rindar sostatt 2.400 krónur árliga í oljuavgjaldi og 2.700 krónur í meirvirðisgjaldi fyri oljuna.

Prísin á heimsmarknaðinum hava vit onga ávirkan á. Men oljuavgjaldið og meirvirðisgjaldið seta vit á sjálvi.

Áðrenn apríl 2000 var oljuavgjaldið í øvugtum lutfalli við oljuprísin. Tað vil siga, at tá oljuprísurin hækkaði, so lækkaði avgjaldið. Á tann hátt fingu vit ein javnari prís. Men í mars 2000 legði Karsten Hansen, landsstýrismaður, uppskot fyri Løgtingið um at fastlæsa avgjaldið á 80 oyrum, og tað uppskotið varð samtykt. Síðani eru oljuprísirnir hækkaðir so nógv, at við gomlu skipanini hevði avgjaldið fyri langari tíð síðani verið komið niður á 0 krónur. Men orsaka av broytingini hjá Karsten Hansen er tað framvegis 80 oyru fyri liturin.

### Mugu taka kjakið nú

Høgu oljuprísirnir eru ein trupulleiki fyri nógvar føroyskar familjur. Sambandsflokkurin er altíð til reiðar at tosa um møgulig tiltøk, ið kunnu avmarka avleiðingarnar av høgu oljuprísunum. Rættast hevði verið, um løgtingið longu nú tók støðu til, hvat vit skulu gera, um prísirnir á olju um eitt ella tvey ár verða uppaftur hægri enn nú.

Eitt hugskot kundi til dømis verið at vent aftur til gomlu skipanina (ella eina líknandi skipan), har ið oljuavgjaldið er í øvugtum lutfalli við oljuprísin. Hetta kundi lætt munandi um hjá føroysku húsarhaldunum, nú prísurin fyri hita er um at geva føroyingum kuldasjálvta.

# Norðoyartunnilin

**Kári P. Højgaard**
*Løgtingsmaður*



Væl fyrisskipað hátíðarhald var fyri innbodnum, tá skotið skotið varð ígjøgnum leygardagin. Sjónvarpið vísti í degi og Viku myndir, har Norðlýsið og norska flaggið saman við posti vórðu handaði gjøgnum tað lítla holið í múrinum, ið skildi arbeiðsbólkarnar, ið høvdu arbeitt ávikavist úr Leirvík og Klaksvík.

Nógvur turbulensur hevur verið kring landstýrismannin í Innlendismálum, sum í langa tíð hevur megna at verið miðdepulin í heimliga orðaskiftinum, har nærum hvør útsøgn frá honum, hevur fest eld í. Tí var tað tí við ávísum ótta og iva, undirritaði tíðum hugdi niður á sjálvlýsandi urskivuna, har stóripinnur hevði kropið sær nakað fram um ásetta 5-talið. Men so komu forloysandi orðini um, at nú vóru 5 minuttir til skotið bleiv. Hesafer var ongin slingur í valsinum hjá Jógvani við Keldu og múrurin fall. Loksins kundi so skerda eysturoyartingmanningin klúgva upp um grótrúgvuna, við Kjartan Joensen skipara úr Leirvík á odda, honum í hølinum Kára P Højgaard, Alfred Olsen, Andreasi Petersen og Jógvani á Lakjuni. Klakvíksmegin vórðu vit hjartaliga væl móttiknir av norðoyartingmonnunum, ið við serstøkum spenningi høvdu sæð fram til hesa løtu.

Kom á tal niðri í tunlinum miðskeiðis undir Leirvíksfirði, á lægsta staðið í Útnorði. Ongin ivi er um, at maðurin er langt frammanfyri sína tíð. Vit fingu greitt at vita, at ongin skilti Jógvan fyri 15 árum síðani, tá hann vísti á tað skilagóða í hesi verkætlanini, sum nú gjørdist veruleiki, og hann hevði fingið rætt. Tað er møguliga trupulleikin, tá ein sær longur fram enn fólk flest, at man kann verða misskiltur av síni samtíð, livst so spyrst.

Borðhaldið var hildið undir hugnaligum umstøðum og maturin var vælsmakkandi og ókvoteraður. Orðið varð ikki frítt, tíbetur, vildi onkur sagt. Ivaleyst høvdu teir tingmenn, ið høvdu leitað sær norður til Klaksvíkar hendan leygardagin, ikki latið orð landstýrismansins í vinnumálum staðið ósvarað, tá hann burtur úr rúgvuni nevndi tveir partamenn. Misstakið skal verða honum fyrigivið, tí farna vikan hevur verið sera strævin. Kappingin við løgmann, um at ganga fremstur í kongaliga fylginum saman við vøkru krúnprinsessuni, krevur sítt. Onkur hevur speiskliga sagt, at høvdu umstøðurnar verið øðrvísi og vitjanin ikki endaði nú, so er spurningurin, um hennara kongaliga hátign hevði fari avstað aftur, tí á nærum hvørjari sjónvarpsmynd, hugdu prinsessan og landstýrismaðurin bergtikin hvør at øðrum.

Aftaná blíðskapin frá vertum og norðingum varð lieit í bussarnar, at njóta seinasta møguleika at koyra ígjøgnum tunnilin á hesum sinni. Kom í bussin, ið skuldi koyra fólkið ein túr til Leirvíkar og aftur til Klaksvíkar. Veitslurómur var á øllum, og søgur og sangur gjørdu túrin alt ov stuttan, har so kendir menn sum Karstin Hansen, Jákup Mikkelsen, Heini O. Heinesen, Steinbjørn Jacobsen, Rodmundur Nielsen o.a. vóru við. Tá ein mikrofon er nærhendis, er ein sovorðin neyð at sleppa at tosa í hana, og gavst hesin møguleikin eisini á túrinum. Undirritaði gjørdi sama mistakið sum landstýrismaðurin í vinnumálum, bert at nevna eitt navn í smb. við tunnilin, men tað skal verða rættað her. Bæði Eyðun Elttør, Karstin Hansen og Heini O. Heinesen áttu saman við góðum kreftum sín stóra leiklut í hesi verkætlan.

Eftir stendur so avbjóðingin Leirvíksmegin, har ein haldgóð loysn skal finnast við tunlinum undir bygdini. Vónandi verða hesi viðurskiftini avgreidd í næstum, so óttin og ampin, leirvíkingar hava av tí komandi øktu ferðsluni, er ógrundaður. Ongin ivi er um, at roknað verður við, at løgmaður í ólavsøkurøðu síni boðar frá, hvør loysn er vald og at hetta er gjørt í samráð við kommunalu myndugleikarnar á staðnum.

Tilukku og góða eydnu við største samferðsluátakinum í nýggjari tíð. Vóni at sambindingarliðið, tunnilin millum Eysturoy og Borðoynna kemur at lætta um gerandisdagin hjá vinnulívinum og teimum fólkum, sum regluliga skulu nýta hesa farleið og verður til signingar og gleði fyri allar føroyingar..